Brandur og Tróndur í Stóra Pakkhúsi

Leygarkvøldið 28. August spæla Brandur og Tróndur Enni í Stóra Pakkhúsi í Vági

TÓNLEIKUR
Dagfinn Olsen
dagfinn@sosialurin.fo

Brøðurnir Tróndur og Brandur Enni spæla tónleik í Stóra Pakkhúsi í Vági leygarkvøldið.

Byrjað verður kl. 22.00. Stóra Pakkhús er tó opið frá kl. 21.00.

Umframt kaffi, te, øl, vín og sodavatn, fæst eisini lættari ábit og okkurt omaná til keyps.

Tiltakið er tað fyrsta í røðini av tónleikatiltøkum í Stóra Pakkhúsi í heyst. Millum annað fær Stóra Pakkhús 11. september vitjan av trubadurunum Johan Piribauer úr Laplandi og Per Warning úr Danmark - hetta tiltakið er í samstarv við Norðurlandahúsið. Annars fara tónleikarar úr Suðuroynni at spæla í Stóra Pakkhúsi leygarkvøld í bæði september, oktober og í november.

Funnið lík niðurgrivið

Danska løgreglan hevur funnið eitt lík, sum var niðurgrivið í Holbæk. Talan er helst tann 51 ára gamli Benny Cederquist, sum løgreglan setur í samband við eitt annað dráp, har ein kvinna av føroyskari ætt er blandað uppí.

Fyrr í summar var ein maður funnin í eini frystiboks í Jyllinge, og í ti sambandi vóru fleiri fólk varðhaldsfongslað – millum annað ein føroysk kvinna, sum viðurkendi drápið.

Síðani kom tað fram, at ein annar maður við tilknýti til fólkini var horvin fyri trimum árum síðani, og løgreglan eftirlýsti mannin. Hann er nú funnin deyður og niðurgrivin á einum garði í Holbæk.

Løgreglan heldur, at maðurin, sum var funnin í frystiboksini, gjørdi av við mannin, sum nú er funnin deyður.

-ek

Einki afturstig

Leiðarin á Brennistøðini á Sandvíkarhjalla, Bárður Michelsen, væntar ikki, at nýggju reglurnar hjá Tórshavnar býráð fyri ruskmóttøkuna verður eitt afturstig fyri borgaran í Tórshavnar kommunu

BURTURKAST
Páll Holm Johannesen
pall@sosialurin.fo

Frá 1. september skulu privatfólk rinda fyri at sleppa av við burturkast ein gerandisdag.

Mynd: Jens Kristian Vang

1. september koma nýggjar reglur í gildið fyri ruskmóttøku á Brennistøðini á Sandvíkarhjalla. Nýggju reglurnar bera við sær, at vanligu gerandisdagarnar verða halgaðir til burturkast frá vinnulívinum, meðan privatfólk bert sleppa av við burturkast leygardag.

Higartil hava privatfólk havt møguleika at sleppa av burturkastið allar dagar, men nú skal ruskið savnast saman leygardag, um tú ikki ynskir at gjalda fyri at sleppa av við tað.

Í lesarabrævi í dag ger býráðslimurin, Leivur Hansen, vart við, at tað kann væl hugsast, at nýggju reglurnar fara at økja um bíðirøðirnar á Sandvíkarhjalla leygardag.

Leiðarin á Brennistøðini á Sandvíkarhjalla, Bárður Michelsen, vísir hesum uppháldi aftur.

Eingin forðan

– Eg vænti ikki, at nýggju reglurnar um, at privatfólk bert sleppa av burturkastið ókeypis leygardag fer at økja um bíðitíðina. Sum er nýta flestu privatfólk nýta leygardagarnar til at sleppa sær av burturkast, og vit hava nógvar byngjur og gott pláss, so eg vænti ikki tað verður nakar trupulleiki, sigur Bárður Michelsen.

Leiðarin á Brennistøðini vísir eisini á, at vitjunartíðin leygardag er longd við trimum tímum, og hetta fer óivað at taka nakað av trýstinum, sum møguliga verður.

Leivur Hansen nevnir í lesarabrævinum, at hann óttast, at longdu bíðirøðirnar leygardag fer at fáa fólk at freistast at velja ta lættastu loynina: at blaka ruskið fyri sær bara onkunstaðni- til miklan ampa fyri bæði umhvørvi og náttúru, sum hann málber seg.

– Tað vóni eg sjálvsagt ikki verður støðan. Eg haldi, at fólk í hesum umhvørvistíðum eru blivin so mikið at sær komin, at slíkur atburður ikki finnur stað.

Eg vil í hesum viðfangi gera vart við, at hava fólk átrókandi tørv at sleppa av við burturkast ein vanligan gerandisdag, tí tey eitt nú hava hildið eina stóra veitslu, so sleppa tey sjálvsagt tað, vísir Bárður Michelsen á.

Minni burturkast

Ofta verður havt á lofti, at burturkast er eitt frálíkt mát fyri, hvussu væl tað gongur búskaparliga í einum landi. Seinasta árið hevur nógv verið tosað um niðurgongd í føroyska samfelagnum, og tí hava vit spurt leiðaran á Brennistøðini á Sandvíkarhjalla um teir merkja, at minni burturkast kemur inn á Brennistøðina.

– Jú vit hava merkt í ár, at burturkastið er minkað nakað sammett við í fjør. Í 2002 og 2003 var nærum líka nógv burturkast, men í ár er nøgdin minkað nakað, sigur Bárður Michelsen at enda.

Ein fyribils loysn

Formaðurin í heilsu- og umhvørvisnevndini, Tórfinn Smith, sigur, at nýggju reglurnar er ein millumloysn, áðrenn ein sonevnd vektskipan verður sett í verk

BURTURKAST
Páll Holm Johannesen
pall@sosialurin.fo

– Nýggju reglurnar eru fyrst gjørdar við tí fyri eyga at fáa greiðan skilna millum privat- og vinnuligt burturkast. Eg vil kalla nýggju reglurnar fyri eina millumloysn, tí ætlanir eru um veruliga at umskipa galdandi skipan, sigur Tórfinn Smith, ið er formaður í heilsu- og umhvørvisnevndini

Hann greiðir frá, at ætlanin er at seta í verk eina sonevnda vektskipan. Við vektskipanini skal alt burturkastið vigast, tá tað verður latið Brennistøðini. Henda skipan skal bæði fevna um vinnuna og vanliga borgaran. Ætlanin er, at vinnan rindar fyri burturkastið, meðan hvørt húsarhald fær eina sonevnda árliga ruskkvotu. Við hjálp av einum korti verður eyga hildið við um húsarhaldið heldur sína ruskkvotu.

Spurdur, nær henda skipan verður veruleiki, sigur Tórfinn Smith, at tað er torført at meta um.

– Seinni í ár verður sum kunnugt býráðsval, og kemur ein onnur samgonga frammat við øðrum ætlaninum, fer henda skipan í vaskið. Heldur samgongan eftir býráðsvalið fast í somu ætlaninum, vænti eg, at tað nýtist ikki at ganga meir enn eitt gott ár, áðrenn vektskipanin verður sett í verk, sigur formaðurin í heilsu- og umhvørvisnevndini.

Avmarkað

Hevur samgongan eftir tínum tykki avmarkað møguleikarnar hjá borgarunum at sleppa av við burturkast?

– Tað kanst tú gott siga, tí eftir 1. september verður bert møguleiki fyri at sleppa av burturkast ókeypis leygardag. Eftir mínum tykki verður henda avmarkingin kortini útjavnað nakað við, at vitjanartíðin verður longd leygardag, og at nýggju skipanirnar gera tað lættari at burturbeina burturkastið í eini handavending, sigur Tórfinn Smith.

Óvissan er ræðulig

Agné Masénaité kom til Føroyar fyri trimum árum síðani at spæla hondbólt við Stjørnuni. Í dag livir hon saman við einum føroyskum manni, og eiga tey ein son. Men við fleiri dømum um útlendingar, sum fáa noktandi svar upp á umsóknir um uppihaldsloyvi, er lívið hjá Agné og hennara familju brádliga vorðið sera óvist, tí hennara visum gongur út í november

SAMRØÐA
Solby A. Eliasen
solby@sosialurin.fo

26 ára gamla Agné Masénaité úr Litavia saman við soninum Gabriel, sum er átta mánaðir gamal. Uppihaldsloyvið hjá Agné gongur út í november, og sum støðan er nú, veit hon ikki, um hon sleppur at leingja tað

Klaksvík:
Í einari litlari kjallaraíbúð búgva Agné, Fróði og sonurin, Gabriel. Fróði arbeiðir á fiskavirki, meðan Agné gongur heima og passar sonin, sum er góðar átta mánaðir gamal.

Hetta ljóðar sum ein púra vanlig føroysk familja, men so er ikki. Ein skuggi hongur oman yvir teimum, og er hann, at Agné, sum er úr Litavia, ikki veit, um hon fær longt sítt uppihaldsloyvi, tá tað gongur út.

Hendan óvissan, sigur Agné, er ræðulig at liva í.

– Eg havi valt at liva her, og familjulívið byrjar at taka skap, og nú er tað brádliga vandi fyri, at alt fer í vaskið, sigur hon, meðan hon eygleiðir sonin, ið spælir á gólvinum.

Agné roynir at lata vera við at hugsa ov nógv um støðuna, sum hon kann koma í, men hon viðgongur tó, at tað er lættari sagt enn gjørt.

Hon heldur, at tað er nógv fyri, at slíkt kann koma fyri. Og samanber hon tað við, at tað verður spælt við familjurnar.

– Hetta ger eisini, at ein kennir ikki vælkomnan í Føroyum longur, leggur hon dent á.

Ómenniskjasligt

Tá Agné, sum hevur búð í Føroyum í trý ár, fyrstu ferð hoyrdi um, útlendingar, sum vórðu sendir av landinum, vildi hon illa trúgva tí. Og sum tað ljóðar á henni, so vil hon illa trúgva tí enn.

– Tað er so ómenniskjaligt at slíta familjur sundur orsakað av eini løggávu. Tað kann ikki vera normalt, sigur hon.

Hon heldur fram, at hon fær seg ikki til at trúgva, at myndugleikarnir fara at nokta henni uppihaldsloyvi framfyri og harvið skilja hennara familju.

– Politikkararnir hugsa bara um búskapin í øllum hesum, tað er púra vist. Kenslur hugsa tey so í øllum førum ikki um, heldur litaviski hondbóltsleikarin.

Hon ristir við høvdinum, meðan hon spyr, um tað ber til at siga við ein persón, sum kemur til eitt ókunnugt land, at hann fyri alt í verðini ikki má forelska seg, meðan hann er har.

– Eg spyrji bara, um hasir politikkararnir ikki hava børn ella ommu/abbabørn sjálvi. Hvat við allari familjuni her, um Gabriel og eg mugu av landinum, spyr Agné.

Hon tosar eisini nógv um uppáhaldið um, at útlendingarnir taka arbeiðið frá føroyingum. Tað halda tey bæði er púra burturvið. Fróði sigur, at hann hevur ikki merkt nakað til, at føroyingar tíma so øgiliga væl at arbeiða við fisk, har sum hann arbeiðir.

– Útlendingarnir í Føroyum arbeiða so at siga bert í fiskivinnuni, og har er mangan tørvur á arbeiðsmegi, so eg spyrji bara, hvar føroyingarnir eru, sum útlendingarnir stjala arbeiðið frá, sigur hann.

Giftið tykkum

Fróði og Agné eru ikki gift, og tað er komið meira enn einaferð fyri, at fólk hava sagt við tey, at nú mugu tey gifta seg, áðrenn Agné verður send heim.

Eisini spyrja fólk ofta, hvat og hvussu tey fara at gera, um Agné ikki sleppur at verða í Føroyum.

– Tað er strævið, tí vit royna jú at lata vera við at hugsa ov nógv um hetta. Hartil eru vit ein familja fyri tað, um vit ikki eru gift, sigur hon. Og leggur púra avgjørd afturat, at hon ætlar sær ikki at gifta seg fyri at kunna verða verandi í Føroyum.

– Tað eru nógv, ið ikki kenna meg, sum siga, at eg eri komin her fyri at fáa barn og so sleppa at verða her. Tað skilji eg slettis ikki, at fólk yvirhøvur kunnu hugsa, tí eg livi bara mítt lív, sum tað er blivið, greiðir hon frá.

Hon hevði ikki droymt um, tá hon sum 23 ára gomul kom til Føroya at spæla hondbólt, at hon fór at búseta seg her og fáa familju.

– Tað var hart tað fyrsta árið at vera her, men eg trívist væl nú. Og eg vil fegin verða her, sigur Agné Masénaité.

Um tað hendir, at Agné fær eitt noktandi svar, so fer Fróði so avgjørt at umhugsa at flyta við teimum, men tað heldur hann kortini ikki er bara sum at siga tað.

– Arbeiðsumstøðurnar har eru munandi verri enn her, so eg veit ikki, um tað hevði verið til, at eg arbeiddi nógv í Føroyum fyri síðani at fara á vitjan í Litavia, sigur hann. Men hann veit ikki, um hann hevði klárað at verið Agné og Gabriel fyri uttan í gerandisdegnum. Agné og sonurin vóru í Litavia í seks vikur herfyri, og Fróði helt tað vera so einsligt ta tíðina, áðrenn hann fór aftaná.

Aftur hondbóltur

Eftir gott hálvtannað ár á áskoðarabeinkinum er Agné umsíðir farin at venja hondbólt aftur. Tað er so hon fegin um, tí sum hon sigur sjálv, er tað gott at sleppa eitt sindur út millum fólk aftur, tá ein gongur heima og passar eitt barn allan dagin.

Men hóast tað, so søkir hon ikki nýtt visum sum hondbóltsleikari.

– Eg kann jú ikki arbeiða, tí eg havi onki ansingarpláss til sonin, vísir hon á. Umsóknin um longt uppihaldsloyvi liggur á borðinum. Agné er ikki líðug at fylla hana út, men so skjótt sum tað er komið upp á pláss, verða skjølini send avstað.

– Og so er bara at bíða, sigur hon og andar djúpt inn.

Agné viðgongur, at Gabriel spælir ein rættiliga stóran leiklut í hesum samanhanginum.

– Hann knýtir jú okkum saman og tvær familjur, sum, hóast tær búgva í hvør sínum landi, nú hava nakað so týdningarmikið sum eitt barn í felag. Og hvat við Gabriel og Fróða, um eg noyðist av landinum, spyr hon.

Agné er sannførd um, at nógv er broytt hjá henni nú.

– So longi sum møguleikin fyri, at eg slikki fáa longt uppihaldsloyvið er tilstaðar, so fer óvissan at hanga oman yvir okkum. Tað ger tað torført at liva eitt vanligt lív, tí vit vita jú ongantíð, um ella nær eg verði send av landinum, sigur hon at enda og gevur Gabriel eitt ordans klemm.

Hann pjátrar og spælir við sama lag á gólvinum, og foreldrini fegnast um, at hann ikki skilir torførу støðuna, sum tey kunnu koma í, tá uppihaldsloyvið hjá Agné gongur út.